TIL **ARBEIÐIS**



FAKTA **HERDIS GAARDBO**

**Starv:** *Sjálv leiðari*
**Besta við starvinum:** *Tað sosiala*
**Ringasta við starvinum:** *Nógv bundin*
**Starvstíð:** *1990*
**Starvsfólk:** *Einsamøll*
**Staður:** *Glyvrar*
**Stjóri:** *Eg sjálv*

*– Nú fari eg at njóta pensjónsárini. Eg haldi, tað er rætt at gevast, meðan man enn finnur hurðina, sigur fryntliga Herdis Gaardbo, sum í meiri enn 20 ár hevur átt og rikið Kiosk Bonus á Glyvrum*

**MYND:** VILMUND JACOBSEN

# Gevst meðan tú enn finnur hurðina

– TAÐ VAR EITT STÓRT TAK Í SÍNARI TÍÐ AT KEYPA **KIOSK** BONUS. ÍLØGAN VAR LUTFALSLIGA STÓR, MEN **SØLAN** VAR BETRI TÁ, ENN HON HEVUR VERIÐ SEINNU ÁRINI. EG HAVI SO ÁTT KIOSKINA ØLL HESI ÁR, OG EG HAVI **MEGNAÐ** AT HAVT HANA **GANGANDI**, SIGUR HERDIS GAARDBO, SUM NÚ ER Í **FERÐ** VIÐ AT RIGGA AV Á GLYVRUM

**TIL ARBEIÐIS**

**Vilmund Jacobsen**
vilmund@sosialurin.fo

Herdis Gaardbo á Toftum hevur átt og rikið Kiosk Bonus á Glyvrum í fleiri ár, men nú heldur hon, at tíðin at komin til at gevast. Enn er lykilin ikki snaraður endaliga, men tað verður hann um heilt stutta tíð. Hon ætlar sær nú at selja kioskina, sum hon keypti, eftir at maður hennara Ivan doyði av sjúku, bert 54 ára gamalur í 1989.

– Enn havi eg opið onkra løtu av og á, tí enn er onkur vøra eftir. Her er nakað av sodavatni og okkurt smávegis aftrat. Tað er ein tíð síðan, at eg segði bløðini frá mær, so tey koma ikki longur. Nakað av vøru kann eisini latast innaftur.

Herdis, sum er fødd 19. oktober í 1940, heldur, at skal hon eiga nøkur ár eftir, har hon ikki er so bundin, sum hon hevur verið hesi meiri enn 20 árini, hon hevur átt og rikið kioskina, so skal tað verða nú.

– Nú ætli eg mær at njóta pensjónsárini, soleiðis sum eg higartil ikki havi havt stundir til at gera. Kioskin hevur verið opin hvønn dag í árinum, undantikið á jólum og páskum, og í nógv ár havi eg onga fasta hjálp havt. Onkur hevur tó verið at heitt á, tá tað hevur borist mær frá at fara til arbeiðis, sigur hon.

## Saknur kortini

Kiosk Bonus á Glyvrum hevur havt opið hvønn yrkadag frá klokkan 14 til 23.

– Hetta vóru mangan langir dagar í eini keðiligari tíð á degnum og kvøldinum. Eg dugi ikki ordiliga at siga, hvussu avgerðin kennist, men tað verður ivaleyst saknur í ikki longur at fara inn í kioskina um dagarnar. Øll hesi ár hava fleiri viðskiftafólk gingið aftur, og tað hevur verið ein serligur hugni at hava havt við hesi fólk at gera. Eg vænti, at eg fari at sakna tað sosiala, sum hetta virksemi hevði við sær, sigur hon.

Herdis sigur, at tá hon keypti kioskina, var meiri virksemi í umhvørvinum kring um økið, og hon hevði eisini onkran at hjálpa sær, tá ástóð.

– Her var Glyvra Bio við sínum virksemi, skótar í kjallaranum í Missiónshúsinum, meiri virksemi í Kvinnufelagshúsinum, og størri næmingar gingu í Glyvra skúla. Okkurt skifti var eisini pylsuvognur, sum alt tilsamans dróg meiri fólk til umhvørvið her rundan um, sigur hon.

Sum kvinna í góðum árum og eftirsitandi við trimum vaksnum dreingjum, tá maðurin doyði, mátti hon taka sær okkurt fyri, sum kundi geva henni eitt fíggjarligt grundarlag.

– Eg arbeiddi í Kiosk Bonus um tað mundið, tá eg keypti. Hetta var ein lutfalsliga stór íløga, sum eg noyddist at fíggja við láni. Hetta var í eini tíð, har fíggjarligu viðurskiftini í Føroyum byrjaðu at gerast trupul, og at kalla alt landið fá ár eftir rendi seg í eina djúpa fíggjarliga kreppu.

Herdis sigur, at hóast at kalla alt samfelagið merkti kreppuna tíðliga í nítiárunum sum ógvuliga tyngjandi, gekk tað kortini hampiliga væl hjá henni tey fyrstu árini, hon átti og rak kioskina.

– Hetta var tungt, men sølan var nógv betri, enn hon hevur verið seinnu árini. Eg havi so átt kioskina øll hesi ár, og eg havi megnað at havt hana gangandi, leggur hon aftrat.

## Fer at selja Bonus

Herdis og Ivan eiga tríggjar synir. Tveir teirra búgva í Danmark, meðan hin yngsti býr á Toftum.

– Eg haldi ikki, at nakar teirra hevur hug til at reka hetta virksemi víðari, sigur hon. Enn er Kiosk Bonus ikki seld, men okkurt er í umbúna, og Herdis væntar, at tað ikki fer at ganga so long tíð, til, at selt verður.

Sum blaðung arbeiddi Herdis nøkur ár í matvøruhandlinum hjá Miu í Tróndargøtu í Havn, men annars var hon eins og mangar kvinnur í kommununi eitt langt áramál á flakavirkinum Nyki á Toftum.

– Eitt skifti arbeiddi eg eisini í matvøruhandlinum í Oyrunum, sum tá varð róptur Oyrahandilin. Mær dámdi væl at arbeiða í handli, sigur fryntliga kvinnan á Toftum.

## Fekk handilsskúlaprógv

Meðan hon arbeiddi hjá Miu í Tróndargøtu sum 15-16 ára gomul, gekk hon um kvøldarnar eisini á handilsskúla, men hon gjørdi seg ongantíð lidnan har.

– Handilsskúlaprógv tók eg ikki fyrr enn nógv ár seinni á Kambsdali. Hetta var veturin 1974/1975, og tá var hetta eisini kvøldskúli, sigur hon.

Herdis Gaardbo riggar nú av á Glyvrum. Eitt langt og stundum strævið kapitul í lívi hennara er av.

– Nú fari eg at njóta pensjónsárini við øðrum enn at standa í eini kiosk frá klokkan 14 um dagin til 23 á kvøldi. Eg haldi, tað er rætt at gevast, meðan man enn finnur hurðina, sigur Herdis Gaardbo.